**10 TING UM**

# PERNILLE ROSENDAHL

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



# Hevði ikki torað við í X Factor sjálv

HON HEVUR VERIÐ VIÐ Í STÓRUM **TÓNLEIKABÓLKUM**, OG NÚ SKAL HON VERÐA VIÐ AT KJÓSA ÁRSINS TALENT Í **X FAXTOR**, MEN SJÁLV HEVÐI **PERNILLE ROSENDAHL** IKKI TORAÐ AT MELDA SEG TIL X FACTOR

**1** Pernille er 37 ára gomul. Hon eigur trý ára gamla sonin Tristan saman við Johan Wohlert, sum hon eisini spælir tónleik saman við í bólkinum The Storm.

**2** Í skúlanum kendi hon seg at verða uttanfyri og einsom.

**3** Pernille gavst í triðja ári á studentaskúla, tí hon var troytt av skúlanum.

**4** Yrkisleiðin sum tónleikari byrjaði í sætta flokki, tá ið hon gjørdist partur av einum reggaebólki.

**5** **Hon var forsangari í bólkinum Swan Lee, sum í nøkur ár var eitt stórt navn í Danmark. Bólkurin gavst at spæla í 2005.**

**6** Stóra fyrimyndin hjá Pernille er amerikanska countrysongkvinnan Dolly Parton – og Pernille hevur sungið kór hjá Savage Rose.

**7** Pernille skrivaði saman við fyrrverandi sjeiki sínum, Tim Christensen, sangin Tomorrow Never Dies til James Bond film av sama navni, men framleiðararnir brúktu heldur ein sang hjá Sheryl Crow.

**8** – Størsta upplivilsið er at fáa eitt barn. Tað broytir alt hjá tær, sigur Pernille.

**9** **Hóast hon bæði livir saman við Johan Wihler og spælir tónleik saman við honum, so sigur Pernille, at tey troyttast ikki av hvørjum øðrum. Tey royna eisini at geva hvørjum øðrum pláss og frið viðhvørt.**

**10** Sjálv hevði hon ikki farið við í X Factor sum sangari, tí hon heldur, at hon er alt ov smæðin til tað.

**SITAT**



Tað var ikki í oyrað, at tú teskaði, men í mítt hjartað. Og tað vóru ikki varrar mínar, tú kysti, men sál mína.

***Judy Garland***

*amerikanskur sjónleikari og sangari*

LAGT TIL RÆTTIS: Inna Törnroos

## MIÐLARNIR OG EG

Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



REKLAMUMAÐURIN OG TÓNLEIKARIN **NIELS ARGE GALAN** ER TÍÐINDA-JUNKIE OG BÍÐAR ENN EFTIR TEIMUM 45 AFTURSVARINUM TÁ HANN SKRIVAR STATUSIN Á FACEBOOK.

**MÍTT BLAÐ – DAG OG VIKUBLAÐ**
Eg eri slett ikki til bløð. Á arbeiðsplássinum skimmi eg tey onkuntíð, hyggi at lýsingunum (ein arbeiðsskaði), men annars er tað á netinum, at eg lesi tíðindi. Tað er so sjáldan at eg siti í frið og havi tíð at befatta meg við bløð. Tað hendir seg tó, at eg keypi okkurt av vikuskiftisbløðunum.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Eg eri tíðindajunkie. Tað ganga sjáldan fleiri tímar ímillum, at eg taki eina rundu gjøgnum Portalin, Dimmu, Vágaportalin (mest fyri undirhald, kanska Ólavur hevur skrivað okkurt skeg) og Norðlýsið. Tá Kringvarpið gavst at dagføra tíðindini á heimasíðu teirra gavst eg at vitja hana. Grams og Kramm byrja spakuliga at koma upp í runduna.

**MÍN TÓNLEIKUR**
Eg brúki mín iPod tá eg eri í bussinum. Annars lurti eg ikki nóg nógv eftir tónleiki longur. Spell, egentliga. Eg havi annars altíð onkra fløgu í bilinum. Eg elski at blanda mær sangir á fløgu, og tær ligga allar í bilinum: Bilfløga, Bilfløga 2, Metal, Cash, Cash2, Koyribob (koyrisligir sangir hjá Bob (Dylan), Ymiskt bøssut, osfr.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Eg eri á Facebook. Har havi eg nógvar vinir, sum eg ikki kenni. Eg havi enn ikki skrivað statusin, sum fekk 45 aftursvør. Antin skrivi eg ov seint ella ov tíðliga á degnum, ella eri eg bara ov óinteressantur. Royni eisini at Twittra viðhvørt, men enn havi eg – hvussu eg so royni – ikki fingið standing av Twitter.



**MÍN DVD**
DVD er – saman við fløgum – eitt ting, sum spakuliga hvørvir úr mínari tilvitsku. Havi enntá fleiri nýggjar filmar, sum eg enn ikki havi latið upp.

**MÍTT MAGASIN**
Langt síðani, at eg havi keypt eitt magasin.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
The Office. Fyrst át eg tað ordiliga, enska rátt. Síðani tað amerikanska. Genialt skemt. Eg fái ikki nóg mikið av the Office. Annars nokti eg at lata sjónvarpið stýra nær eg hyggi eftir hvørjum. Um eg fylgi eini røð, so er tað oftast alt í senn, antin á dvd ella á telduni.



**MÍN BÓK**
Lesi beint nú »Priceless« eftir William Poundstone. Sera áhugaverd bók um hvussu vit uppfata prísir. Eisini liggur bókin »The Designful Company« eftir Marty Neumeier á náttborðinum. Um hvussu tú uppbyggir eina innovatiónsmentan á arbeiðsplássinum.

**MÍTT ÚTVARP**
Tíðindi kl. 7. Skrúvi niður og/ella lati oyruni aftur tá morgunlesturin kemur. Onkuntíð eru tíðindini á døgurða frá á arbeiðsplássinum tá vit eta. Onkuntíð tíðindi á Rás2 kl. 17, altíð tíðindini í Kringvarpinum kl. 18. Annars lurti eg ikki eftir útvarpi.



**MÍN TELEFON**
Eg havi ein iPod við innbygdari telefon. Tað eitur ein iPhone. Feitasta telefon nakrantíð.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Eg var líka við at fara at reksa alt frá kvøðuljómum til morgunlestur upp, men so mintist eg til, at eg jú bara kann sløkkja. So tað geri eg bara.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Sendingar, har innihaldið er (illa fjald) reklama.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Eg kundi hugsað mær, at alt varð meira segmenterað. Sum nú er, er alt fyri øll. Og eingin er øll, serliga ikki eg. Tá tú roynir at siga alt og gleða øll í senn, endar tú oftani við at siga einki og gleða ongan. Hetta eigi eg at vita. Eg eri jú reklamumaður.